# Stranda skúli
# Menningarætlanir



Innihald

Virðisgrundarlag s. 2
Trivnaður, happing s. 4
Samstarvið millum heim og skúla s. 13
Atferðartrupulleikar s. 15

# Menningarætlan – Virðisgrundarlag

1. Menna sjálvsálitið hjá hvørjum einstakum næmingi
2. Læra næmingarnar at vísa umsorgan og fyrilit fyri øðrum
3. Geva næmingunum gott fakligt støði
4. Læra næmingin at taka ábyrgd av egnum gerðum

Mál í hesum samanhangi eru:

· Skúlin má geva næminginum álit á seg sjálvan, so hann í góðum treysti møtir tí nýggja við spenningi og arbeiðshugi.
· Næmingurin má menna seg sjálvan til at koma víðari og vinna á egnum forðingum.

· Góð frálæra skal geva næminginum upplivingar, har hansara verk eydnast og harvið geva honum álit á egnar førleikar og evni og menna ábyrgdarkenslu fyri egnari læring og egnum lívi.

Skúlin skal:

· Hjálpa næminginum at verða tilvitaðan um sínar sterku síður.
· Útnytta og menna víðari sterku síðurnar, so næmingurin fær kensluna av at eydnast.
· Geva næminginum hjálp at venja viljan og til at royna nýggjar avbjóðingar

Skúlin skal vera eitt gott stað at vera í, og tí er umráðandi, at øll hava fyrilit hvør fyri øðrum

Skúlin skal:

· Leggja undirvísingina soleiðis til rættis, at næmingurin kann koma fram við egnum meiningum og læra at lurta eftir hvørjum øðrum.

· Ansa eftir, at eingin verður happaður og seta tiltøk í verk, um tað kortini hendir

· Skipa fyri tiltøkum fyri at fáa øll við í felagsskapin.

Skúlin skal:

· Geva næminginum møguleika at ogna sær vitan og førleikar, sum eru neyðugir til víðari læring

· Frálæran skal leggjast soleiðis til rættis, at næmingurin far sum mest burturúr

· Skapa eitt læruumhvørvi, sum er merkt av skipaðum og friðarligum samskifti. Næmingurin skal hava samábyrgd í hesum

· Hugkveikja og leggja tilrættis, so næmingurin kann nýta sína vitan og arbeiðslag til at læra enn meir.

Skúlin skal læra næmingin at taka

· Ábyrgd av egnari læru
· Ábyrgd av samveruni við øðrum í skúlanum
· Ábyrgd av einum jaligum og góðum skúlaumhvørvi.

# Menningarætlan – Trivnaður, happing

Tað eigur at vera ein rættur hjá øllum næmingum at kunnu kenna seg tryggar í skúlanum. Trivnaður er ein grundleggjandi fortreyt fyri einum góðum læriumhvørvi. At læra krevur tí, at tú hevur álit á teimum, tú arbeiðir saman við, teimum, tú gongur í flokki saman við og trívist í umhvørvinum, tú ert í.

**Endamál:**

- øll skulu trívast og kenna seg trygg
- øll skulu vísa fyrilit og umsorgan fyri hvørjum øðrum
- øll skulu taka ábyrgd av egnum gerðum
- menna sjálvsálitið hjá hvørjum einstøkum næmingi
- eingin verður happaður, tvs. at eingin næmingur skal taka lut í ella góðtaka, at næmingar verða argaðir út úr felagsskapinum

**Høvuðsmál:**

1. Næmingarnir kenna, at teir eiga lut í avgerðum
    a. næmingar verða tiknir við upp á ráð, t.d. at gera fastar mannagongdir fyri atburði
    b. avgerðir í flokkinum verða tiknar í felag
2. Samstarv og samskifti
    a. millum lærarar
    b. millum lærarar og næmingar
    c. millum næmingarnar í flokkinum
    d. millum lærarar og foreldur
3. Ábyrgd

**Hvussu náa vit málunum?** *(víst verður til pkt. omanfyri)*
1 a. Floksreglur. Næmingarnir koma sjálvir við uppskotum um neyðugar reglur, fyri at allir skulu hava tað gott í flokkinum. Teir halda betur reglur, sum teir sjálvir hava verið við til at gjørt. Vit eiga at minnast til positivar umformuleringar av reglum. Í staðin fyri at siga “Ikki er loyvt.............” skulu reglurnar ljóða “Øll skulu sleppa.................” Floksreglur eiga at endurskoðast minst eina ferð um árið. Flokslærarin hevur ábyrgd av, at reglur verða gjørdar.

1 b. Floksfundir. Fundir um sosiala lívið í flokkinum verða hildnir javnan umleið eina ferð um mánaðin, har næmingarnir sita í ringi. Lærarin ger av, hvar hvør skal sita og er orðstýrari. Í bókini ”Ikke mere mobning” eru reglur um, hvussu ein sovorðin fundur kann skipast. Flokslærarin hevur eisini ábyrgd av, at fundirnir verða hildnir.

2 a. Lærarasamstarv. Læraratoymið tosar saman um, hvussu teir kunnu vera fyrimyndir í flokkinum í fyribyrgingini av happing. Hvussu teir skulu fara við næmingunum, taka teir við í avgerðum, vísa tolsemi mótvegis teimum o.s.fr. Niðurstøðuna kann toymið so eisini leggja fram fyri hinar lærararnar, sum hava flokkin

2 b. Flokkurin. Fyri at læra næmingarnar at vera saman, kann lærarin gjøgnum árið av og á flyta teir, so at teir hava sitið saman við øllum næmingunum, tá ið árið er farið. Í sambandi við felags- og bólkaarbeiði kann hann eisini á ymiskan hátt seta næmingarnar at arbeiða saman, so at allir hava roynt at arbeiða saman við øllum.

Einstaklingasamrøður. Minst eina ferð um árið tosar lærarin við hvønn einstakan næming. Samrøðan kann verða gjørd út frá einum spurnarblaði, víst verður til spurnarblaðið aftast. Hetta gevur læraranum innlit í sosiala lívið í flokkinum. Tað kann geva læraranum møguleika at fáa eyga á trupulleikar, sum seinni kunnu útvikla seg til happing, um einki verður gjørt við tað. Flokslærarin hevur ábyrgd av, at hetta verður gjørt.

2 c. Felags upplivingar. Tað hevur týdning fyri samanhaldið í flokkinum at fáa felags upplivingar. Skipað verður fyri tiltøkum fyri at fáa øll við í flokkinum. Felags upplivingar eru t.d.

- seturskúlar
- útferðir
- hugnakvøld
- evnisdagar
- sjónleikur
- næmingatiltøk / foreldratiltøk
- drama / tónleikur – framføra fyri hvørjum øðrum

Við felags upplivingum hava allir næmingarnir eisini okkurt felags at práta saman um. Teir koma at kenna nýggjar eginleikar hjá hvørjum øðrum. Næmingar, sum ikki klára seg so væl bókliga, duga okkurt annað og kunnu í ymiskum tiltøkum uttan fyri skúlan verða virdir av floksfeløgunum. Tað er eisini gott fyri næmingarnar at spæla sjónleik, tí tá fáa teir eina aðra rollu, enn teir vanliga hava í gerandisdegnum. Tað kann hjálpa tí smædna at koma meiri fram í flokkinum og fáa tann dominerandi at trekkja seg eitt sindur aftur.

2 d. Foreldra- og lærarasamstarv. Foreldrini verða kunnað um, at skúlin hevur sum mál at fyribyrgja allari happing í skúlanum, og at skúlin væntar, at foreldrini vilja hjálpa til við at náa hesum máli. At tey siga skúlanum frá, um barn teirra ikki trívist í skúlanum og læra børn síni at góðtaka sínar floksfelagar. Skúlin væntar eisini av foreldrunum, at næmingarnir er væl fyri, tá ið teir koma í skúla, væl svøntir, reinir, væl fyrireikaðir og at skil er í skúlataskuni.

3 Ábyrgd. Vit hava í flestu førum sett flokslæraran at taka sær av teimum ymisku tiltøkunum, tí vit meta, at tað er best, at ein lærari hevur høvuðsábyrgdina, fyri at vera vísar í, at arbeiðið verður gjørt. Hetta krevur so eisini, at flokslærarin hevur nógvar tímar í flokkinum, ella at floksins tími verður settur á tímatalvuna. Fyrimunur er eisini, at ikki ov nógvir lærarar eru um sama flokk, so tað verður lættari at samstarva um flokkin.

Sjálvt um vit hava illgruna um happing í einum flokki ella ikki, halda vit, at dagar skulu verða settir av til fjóðra árgang hvørt skúlaár, har djúpari verður farið niður í evnið "Happing" fyri at finna fram til, um happing er í flokkinum. Harvið síggja vit, um fyribyrgingararbeiðið hevur hjálpt, ella vit

mugu arbeiða meiri við trupulleikanum. Er eingin happing í flokkinum, verður kortini hildið fram við fyribyrgingararbeiðinum.

---

## *Arbeiðsætlan fyri 4. flokk*

Hesin parturin byggir á bókina "Ikki mere mobning" hjá Helle Høiby. Rátt verður til at lærarin, sum fer undir hesa arbeiðsætlan, lesur bókina, áðrenn hann byrjar.

Áðrenn farið verður í gongd, er umráðandi, at leiðsla skúlans er væl kunnað, og at hon stuðlar arbeiðsgongdini.

Fyrsta stig í sjálvari arbeiðsgongdini er, at næmingar koma koma til samrøðu. Áðrenn samrøðurnar, fáa næmingarnir bræv heim, har foreldrini verða kunnað. Næmingarnir koma aftur við undirskrift frá foreldrunum, har tey játta, at næmingurin fer til samrøðu.

Arbeiðsgongdin:

1. Kanning

2. Broyting

3. Tíðin aftaná

1. Kannning
Áðrenn næmingarnir fara til samrøðu, er fundur í flokkinum. Tá fundur er í flokkinum, verða borðini flutt til viks, og næmingarnir sita á stólum i ring. Har verða næmingarnir kunnaðir, hvat fer at henda. Næmingarnir fáa at vita, hvør hevur samrøðurnar, og at tað er tagnarskylda hjá teimum, sum hava samrøðurnar. Eingin einstakur næmingur verður endurgivin sum einstaklingur, møguliga verður sagt at 15 út av 22 siga…… Eisini verður sagt við næmingarnar, at tey ikki tosa sínámillum um, hvat tey verða spurd um, fyri at arbeiðið skal eydnast so væl sum gjørligt.

Tað er umráðandi, at næmingarnir er væl kunnaðir um, at arbeiðsgongdin er fyri at vita, hvussu tey hava tað saman í flokkinum og at bøta um vinarlagið.

Samrøðurnar fara fram í hugnaligum umhvørvi, har arbeiðsgongdin ikki verður órógvað.

Áðrenn samrøðurnar skulu lærararnir vita, hvat teir spyrja og siga undir og eftir samrøðuna. Tað er sera umráðandi, at tað er lærarin, sum førir samrøðuna og ikki næmingurin!

Næmingarnir koma til samrøðu eftir eini raðfylgju, sum lærarin hevur gjørt. (s.41 í ”Ikki mere mobning”)

2.Broyting
Samrøðurnar eru í hølum, har næmingurin er tryggur at siga tað, hann hevur hug til. Eitt høli har samrøðan ikki órógvast, t.d. høli uttan fyri skúlan.

Samrøðan byrjar við at minna næmingin á, at lærararnir hava tagnarskyldu, og at næmingurin kann kenna seg tryggan. Alt verður skrivað upp á spurnarblaðið.

Undir samrøðunum við happarnar og viðhangarnar skal lærarin vera neutralur og ikki dømandi. Kennir næmingurin, at læraranum ikki dámar tað hann sigur, og at lærarin tekur avstand, er verri hjá næminginum at tosa frítt. Undir samrøðuni við ofrið, minnir lærarin á, at nú ofrið tosa frítt og siga tað, hann hevur hug til.

Tá allir næmingarnir hava verið til samrøðu, hyggja lærararnir eftir og greina svarini.
Tá teir hava greinað spurnarbløðini, kunnu lærararnir síggja tað sosiala mynstrið í flokkinum, um tað verður argað ella happað í.

Eftir hetta vera styttri samrøður við nakrar næmingar.

1. Samrøða við tann sum verður happaður, uml. 20 minuttir. Her verður gjørt greitt at happingin er endað.

2. Stutt samrøða við happaran, ein í senn. Her verður gjørt greitt at happingin er endað.

3. Stutt samrøða við viðhangararnar. Her verður gjørt greitt at happingin er endað, og at tey verða hjálparar.

4. Fundur í flokkinum ”Frá happing til vinarlag”, uml. 20-30 minuttir. Lærarin avger, hvar næmingarnir sita.

5. Bólkaarbeiði ”Hvat er gott vinarlag/góður vinur, 30 minuttir í bólkum, og 15 minuttir at leggja fram. (stendur meir at lesa í ”Ikke mere mobning s. 54-59.)

3. Tíðin aftaná.
Tíðina aftaná verður hildið fast um gott vinarlag í flokkinum. Hetta verður gjørt á
- floksfundum
- møguliga samrøðu við happararnar
- møguliga samrøðu við ofrið

- møguliga samrøðu við viðhangararnar
- foreldrafundir
-møguliga samrøður við foreldur

Reglur fyri floksfundirnar:
- lurta, ein tosar í senn
- ikki avbróta, meðan ein annar tosar
- gev klár boð. Tosa út frá tær sjálvum.
- ikki umbera teg, t.d. eg gjørdi tað, tí at…..
- tosa beinleiðis við tann, sum tú tosar um. (Rúni, kanst tú lata vera við at kalla meg…?)
- Ver ítøkiligur – tak útgangsstøði í ávísum hendingum
- Vís ábyrgd fyri samtyktum reglum og avtalum.

Fundir verða síðan eftir tørvi í flokkinum, ella í minsta lagi eina ferð um mánaðin.

## Spurningar til trivnaðardagar

Navn:____________________________

Endamálið við hesari samtalu er, at allir næmingarnir fáa tað best møguligt í flokkinum.

Vinir og floksfelagar fáa ikki at vita tað, sum tú sigur her. Hetta er eitt prát millum okkum trý. Ongin annar fær at vita, tað tú sigur. Kunnu nýta tøl, t.d. 15 út av 20 siga….. men vit nýta ikki nøvn yvirhøvur.

1. dámar tær at ganga í skúla?

- hvat gleðir tú teg mest til/stúrir mest fyri?

- ella hvat er gott/ikki gott við skúlanum?

2. eru tað ávísir tímar, tær dámar serliga væl?

- nær eru tímarnir bestir?

- hvat er tað, sum ger, at tær dámar best hesar tímar?

3. eru tað ávísir tímar, tær ikki dámar so væl?

- eru allir í somu lærugrein?

4. Hvussu dámar tær fríkorterini?

- eru góð fríkorter?

- hvønn spælir tú tá við?

- hvussu ofta um vikuna heldur tú, at fríkorterini eru góð?

5. eru tað fríkorter tær ikki dámar?

- hvat hendir tá?
- hvønn er tú tá saman við?
- Hvønn kundi tú hugsað tær at verið saman við?
- Hvat kundu vit evt. gjørt, fyri at tú kundi verið saman við honum?
- minnist tú nakað fríkorter, sum tær dámdi væl?

6. Hvør heldur tú bestemmar mest í flokkinum?

- hví heldur tú, at tey bestemma mest?

7. Hvønn situr tú við síðurnar av?

- hvussu gongst tað?
- hvussu dámar tær tað?

8. Heldur tú at øll í flokkinum hava tað gott?

- heldur tú at tað er nakar annar í flokkinum, sum ikki hevur tað gott?
- er tað onkur, sum fær keðiligar viðmerkingar?
- er tað nakar, sum verður happaður?
- Hvat gera tey, tá tey happa?
- Hvat siga tey?
- Hvørji eyknevni nýta tey?

- Hvør byrjaði?
- Hvørji børn eru við?
- Er tað nakar, sum roynir at hjálpa?
- Hvat gera tey?
- Hvat hendir so?
- Hvat heldur tú, um tað tey gera?
- Torir tú, um vit eisini eru við ella stuðla tær at siga við happaran, at tað er skeivt, sum hann/hon ger?
- Torir tú, um tað høvdu verið fleiri onnur við?
- Hvussu nógv onnur skulu vera við, fyri at tú torir at siga frá?

9. <u>Um tú sjálvur skuldi valt, hvønn næming vildi tú helst verið saman við, hvør skuldi tað so verið, tú kanst gott velja tríggjar næmingar, nr.1, nr.2 og nr.3?</u>

Her kanst tú gera eina talvu eins og tann í bókini.

10. Hevur tú nakað uppskot, hvussu vit kundu fingið tað betrur í flokkinum?

11. Er tað annars nakað, sum tú heldur, at vit skuldu vita um vinalagið/samanhaldið í flokkinum? (gott og minni gott)

Vilt tú tosa við ein av okkum einsamøll/mallur?

Hvussu upplivdi/dámdi tær samtaluna?

Ikki tosa um spurningarnar við onnur fyri at fáa mest burturúr.

Góða eydnu!

# Samstarvið millum heim og skúla.

Heim og skúli kunnu als ikki vera hvørt annað fyri uttan, og bert við hollum og góðum samarbeiði kunnu næmingarnir fáa sum frægast burtur úr skúlagongdini.

Samarbeiðið millum heim og skúla er lógfest og eigur tí at vera í rættiliga føstum kørmum til tess at tryggja eitt gott úrslit.

Besta samstarvið fæst við, at skúlin vísir á og ger púra greitt, hvørjar uppgávur og ábyrgd skuli og heim hava hvør í sínum lagi mótvegis næmingunum.

**Hvat kunnu foreldur vænta av skúlanum?**

- At børnini fyrst og fremst fáa holla undirvísing sambært tí, sum skúlalógin fyriskipar
- At skúlin hevur lærarar við hollum kunnleika at undirvísa
- At lærara møta til tíðina og eru væl fyrireikaðir
- At lærarar møta børnunum á tí støði, tey eru, og haðani eggja teimum at læra
- At børnini verða lærd samanhald, ábyrgd og vinalag í flokkinum
- At lærarar eru fólkaligir og tosa hampuliga við næmingar og felagar
- At lærarar geva foreldrunum boð, so tíðliga sum gjørligt, um børnini ikki fylgja nóg væl við í skúlanum, og at foreldrini fáa at vita, um tey skulu hjálpa børnunum meira við heimaarbeiði
- At foreldur fáa boð, so tíðliga sum gjørligt, um barnið órógvar ella er ov friðarligt og einsamalt

**Hvat væntar skúlin av foreldrunum?**

At næmingarnir:

- Møta rættstundis
- Hava etið morgunmat og eru væl hvíldir
- Hava gjørt heimaarbeiði
- Eru fólkaligir, og tosa hampuliga við lærarar og felagar
- Ikki órógva í stovuni ella í skúlanum sum heild
- Hava matpakka við, tá teir eru í skúla í matarsteðginum

At foreldrini:

- Hjálpa børnunum við heimaarbeiði
- Greiða børnunum frá, at skúlin er arbeiðspláss hjá børnunum og hjá læreranum, og at tað hevur týdning, at tey virða skúla, lærara, felagar og øll, sum eru í skúlanum
- Læra børnini samanhald, ábyrgd og vinarlag
- Boða skúlanum frá, um serlig viðurskifti eru galdandi við einum barni (td. sjúka)

Í eini mynd kann skúlatilveran hjá næminginum lýsast soleiðis:




Tað er sjálvsagt, at næmingurin fær mest burturúr sínari skúlatilveru, um báðir partar gera sínar skyldur til lítar. Ikki sleppa skúlin og heimið undan samstarvi. Nakrar av uppgávunum eru tær somu hjá bæði skúla og heimi, og tí er umráðandi, at báðir partarnir kenna hugburðin hvør hjá øðrum. Jú betri samstarv, tess størri úrtøku fær næmingurin.

Til tess at fáa eitt gott og fruktagott samstarv millum skúla og heim, er upplýsing alneyðug. Ábyrgdin av hesi upplýsing eigur skúlaleiðslan í fyrsta lagi. Leiðslan skal fyrst syrgja fyri góðari upplýsing innanhýsis og birta upp undir gott samstarv millum lærara og leiðslu og lærarar sínámillum. Til tess at fremja samstarvið við heimini, kann skúlin t.d.

- Hava eina heimasíðu við allari neyðugari kunning
- At lata heiminum eitt blað, har allar ætlanir fyri skúlaárið eru lýstar og dagførdar.

# Menningarætlan – næmingar, ið hava atferðartrupulleikar.

**Støðulýsing:**

Tá ein næmingur hevur atferðartrupulleikar tosa lærarnarnir saman og evnið verður viðgjørt í toyminum, har avgjørt verður hvussu tey loysa trupulleikan. Hjálpir hetta ikki, verður tosað við foreldrini og næmingin sjálvan. Um hetta heldur ikki hjálpir, kemur leiðslan inn í myndina og ofta verður serkøn hjálp eisini tilkallað. Vit hava higartil fingið hjálp frá t.d. heilsusystur, sálarlækna, sernámsdeplinum v.m.

**Tað góða avrikið:**

- Tað er væleydnað tá næmingurin sjálvur, lærararnir, floksfelagarnir, skúlin og foreldrini annars eru nøgd við atburð næmingsins.
- Tá skúlaupplivingin er góð fyri allar partar.

**Mál:**

At næmingurin hevur ein atburð, sum allir partar kunnu góðtaka innanfyri rímiliga tíð. (Í hvørjum einstøkum føri)

**Virksemisætlan:**

- Áseta felags reglur fyri skúlan:
  - Galdandi reglar verða endurskoðaðar.
- Gera reglar fyri hvussu vit gjøgnumføra ásettu reglurnar:
  - Næmingar og foreldur verða kunnað um reglurnar, tá næmingarnir verða innskrivaðir, og fyrsta tíðin í skúlanum verður í stóran mun nýtt til at læra hesar reglar.
  - Í minsta lagi tvær ferðir um árið verða tímar settir av til "kunnan" um hesar reglur, samstundis sum vit dagliga minna á, tá reglurnar ikki verða yvirhildnar.
- Áseta reglur fyri hvat hendir, tá "felagsreglurnar" verða brotnar:
  - Seta bólk á stovn við 4-5 lærarum, sum skulu fáa ávísa útbúgving og sum síðan kunnu vera við til at ráðgeva toyminum í hvørjum einstøkum føri.

Eftirmetingarætlan:

- Hvat skal verða eftirmett?

  Eftirmetingin skal taka støði í atburði næmingsins. Kanna verður um allir parter eru nøgdir við atburðin.

- Hvussu verður eftirmett?

  Bólkurin hevur samrøður við allar partar um hvussu gongur. Avtala verður gjørd frammanundan um nær eftirmetingini skal í gongd, t.d. dagin eftir, eina ella tvær vikur seinni. Eftirmetingin skal halda áfram so leingi næmingurin er í skúlanum ella til trupulleikin endaliga er loystur.

- Hvør eftirmetir?

  Bólkurin hevur ábyrgdina av at eftirmetingin verður framd.

- Annað

  Bólkurin skal bera upplýsingarnar víðari til viðkomandi partar. Eftirmetingin verður nýtt soleiðis, at næmingurin ikki aftur fellur í somu grøv, og til at viðgera líknandi støður seinni.